# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Tøkk

Hjartaliga takki eg tykkum øllum, sum gjørdi mær 85 ára føðingardagin ógloymandi.
Takk fyri vitjan, gávur, fjarrit og uppringing.

Gleðilig jól og gott nýggjár.

**Heilsan**
**Estrid Jensen, Porkeri**

## Tøkk



Øllum teim, sum gjørdu mær 90 ára dagin, 8. nov., ómetaliga hugnaligan og hátíðarligan, takki eg hjartaliga.
Takk fyri stóra hjálp, fjarrit, blómur og gávur og ein serlig tøkk til tónleikararnar frá GHM, sum settu sín serliga dám á veitsluna.

Eini gleðilig jól og Harrans signað nýggjár ynski eg tykkum.

**Martin Vilhelmsen**

# Próvtøkur á Klaksvíkar Sjómansskúla



Hesir kokkar fingu prógv á Klaksvíkar Sjómansskúla tann 14. desember 2007.
Standandi f.v.: Olivia Midjord, Tórheðin í Dali, Pætur E. Rasmussen, og Gunnar Olsen. Sitandi f.v.: Linda Jacobsen, Poul Johannus Næs, Jana Maria Eliasen, Barbara Johannesen og Jens Sørensen.



Hesir hava gingið í Sjóvinnuflokkinum á vetri 2007. Standandi f.v.: Andrias Jacobsen og Høgni Djurhuus. Sitandi f.v.: Helgi Sølmunde, Rani í Lon Jacobsen og Hans Olivar Simonsen

Eina hjartans tøkk veita vit okkara børnum við familju, sum gjørdu gullbrúdleypsdagin so góðan fyri okkum. Takk øll tit, sum komu at heiðra okkum henda stóra dag. Takk fyri gávur, telegramm, heilsanir, blómur, talur og sang. Vit takka eisini hjartaliga øllum sum annars hjálptu so væl til á ymsan hátt.



Hjartans takk øll somul við ynskjum um eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.

Gullbrúðarparið
*Kristina og Archibald Norðberg*

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við